# Virðislønir handaðar í dag

**Í dag, hósdagin, klokkan 17 handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens og Barnabókaheiðurslønir Tórshavnar býráðs í Müllers Pakkhúsi**



*Tvær virðislønir kunnu latast, men nevndin hevur eisini heimild til bert at lata eina ella onga, í ár verða tvær latnar.*

**VIRÐISLØNIR**

1958 var fyrsta árið, virðislønin varð latin, og heitið tá var Bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens. Ein ella tvær virðislønir kundu verða latnar. Í 1972 varð Reglugerðin fyri Bókmentavirðisløn M. A. Jacobsens broytt, soleiðis at onnur virðislønin skuldi vera fyri fagurbókmentir og onnur fyri yrkisbókmentir.

Í 1985 varð reglugerðin aftur broytt. Nú bar til at lata tríggjar virðislønir fyri ávíkavist fagurbókmentir, yrkisbókmentir og mentanaravrik. Nevndin fekk heimild til okkurt árið ikki at lata onkra av virðislønunum.

Tórshavnar kommuna samtykti smávegis broytingar í 1996, m. a. er heitið nú Reglugerð fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens.

Í nevndini fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens eru fimm limir. Teir verða valdir fjórða hvørt ár, tá ið nýtt býráð er valt og skipað. Kommunan velur tríggjar limir, Fróðskaparsetrið ein og Rithøvundafelagið ein.

Í januar 2005 var ein nýggj nevnd sett. Tórshavnar kommuna valdi nýggjan lim, Rigmor Dam fyri Egon Hansen, Erling Isholm og Jákup Jacobsen eru afturvaldir.

Fyri Fróðskaparsetrið er Turið Sigurðardóttir afturvald, og fyri Rithøvundafelagið er Gunnar Hoydal afturvaldur.

Eingin formaður er í nevndini. Fastur skrivari er býarbókavørðurin, Anna Brimnes.

Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs varð fyrstu ferð latin í 1976. Í nevndini fyri henni eru fimm limir. Nevndin verður vald av nýggjum eftir hvørt býráðsval.

Fastur limur er barnabókavørðurin á Býarbókasavninum í Tórshavn, Malan Hilmarsdóttir, skrivari, ein limur valdur fyri skúlabókavørðarnar í Tórshavnar kommunu, Hansina Huusgaard, tveir limir, valdir av Tórshavnar kommunu, Poulina Slættanes og Ann Elisabeth Joensen.

Formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar kommunu er fastur formaður í nevndini. Í hesum skeiðnum er tað Hildur Eyðunsdóttir.


J. Bronckgøta 37 · Postboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf 34 59 00 · Fax 34 59 50 · office@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.DK

HEIM TIL JÓLA?
VIÐ NORRÖNU, SJÁLVANDI

Vit eru longu í jólahýri og bjóða sera góðar prísir til tey sum ætla sær heim til Føroya á jólum. Ferðast heim við Norrönu og lat frítíðina byrja longu umborð – tak bilin við og so nógv viðføri, sum tú hevur hug til.



Nú standa jólini skjótt aftur fyri durum, og tíð er at hugsa um at tryggja sær ferðaseðilin heim. Tilboðini frá okkum eru nærum ógjørlig at koma uttan um.

Í samband við túrin 17. desember Hanstholm-Tórshavn verður skipað fyri beinleiðis bussfluttningi úr Keypmannahavn yvir Odense, Århus og Ålborg til Hanstholm.

Til túrin Tórshavn-Hanstholm 28. desember verður skipað fyri beinleiðis flutningi úr Hanstholm yvir Ålborg, Århus, Odense til Keypmannahavnar.

Fyri hvønn fram og aftur bert kr. 500*,-

Ferðaætlanin hjá Norrönu er broytt um jólini og nýggjárið. Fráferð úr Tórshavn er den 28. des. mikudag kl. 21.00



Tey fyrstu fáa tær bestu koyggjurnar

Fráferðir úr Hanstholm: 3., 10. og 17. desember '05 kl. 16.00
Fráferðir úr Tórshavn: 28. des. & 12. jan. kl. 21.00

Ferðaætlan fyri Smyril Line buss 17. des. og 30. des. 2005

| 17.12.05 | Staður | 30.12.05 | Kostnaður* |
|---|---|---|---|
| 08.00 | Keypmannahavn , Ingerslevsgade | 18.00 | 250 |
| 10.00 | Odense, Dannebrogsgade | 16.00 | 200 |
| 12.00 | Århus, Musikhuset | 14.00 | 150 |
| 13.30 | Aalborg Rutebilstation | 12.30 | 100 |
| 15.00 | Hanstholm Havn | 11.00 | * fyri hvønn ein veg |

Ferðaseðlar til bussin skulu bíleggjast frammanundan og kunnu ikki keypast í bussinum. Børn (upp til 12 ár), sum nýta eitt sitipláss, gjalda ½ prís.

PRÍSIR
15.10.2005-31.3.2006

Vaksin, lesandi, eftirlønt ........500*,-
Børn (5-12 ár) ..........................250*,-
Bilur upp til 2,5 m H og 7 m L........0,-
Bilur fyri eyka m í H og L ...........50,-

**Prísurin fatar um** ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm. Øll kømur hava wc/bað.

*Ikki galdandi fyri svitu og luksuskamar. Oljuavgjald á kr. 120,- er ikki íroknað prísin

Droym tað ikki – royn tað!

SMYRIL LINE


# Oljutingið bjóðar til heystting

**Árliga heysttingið hjá Oljutinginum verður 5. oktober kl. 19.00 á Sjómansskúlanum í Havn. Evnini, sum verða viðgjørd eru: Loysn á basaltknútinum? og fyribils úrslit frá Sindri**

Nevndin í Oljutinginum sigur í skrivi, at ein av størstu avbjóðingunum oljufeløgini eru komin fram á í Føroyum, er hvussu ein kann síggja ígjøgnum basalt fláirnar, sum fevna um ein stóran part av føroyska landgrunninum. Eisini er tað tungt at bora ígjøgnum basalt, tí tað er so hart. Hesar báðar avbjóðingarnar hava frá skriving í bløðunum fingið navnið: basaltknúturin.

Lars Beksgaard, formaður í Sindri fer at greiða frá arbeiðnum, ið Sindri hevur staðið fyri, fyri at loysa basaltknútin. Eisini fer hann at tosa um framtíðarætlanir hjá Sindri. Lars Beksgaard hevur í nógv ár verið økisleiðari hjá danska oljufelagnum DONG við ábyrgd fyri oljuleiting í føroyska, grønlendska, norska og bretska økinum. Hann hevur eisini umboðað DONG í felagskapinum Føroya Oljuídnaðarbólkur (FOÍB) í fleiri ár.

Tey, ið vilja vera við til Oljutingið skulu boða boða Vinnuhúsinum frá luttøku á telefon 309900 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo